# Leiðari til sosialu deildina hjá
## Fuglafjarðar kommunu

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 30. juni 2005 samtykt at seta sosiala deild á stovn tann 1. oktober 2005 og at søkja eftir leiðara til deildina.

**Starvið**
Tú kemur sum leiðari av Sosialu deild at taka tær av leiðsluni av allari fyrisiting av deildini, herundir málsviðgerð av almannamálum, sum sambært lóggávuni eru ella verða løgd til kommununa. Sum leiðari verður tú eisini skrivari og ráðgevi hjá sosialu nevnd og ráðgevi og málsviðgerði og skrivari hjá barnaverndarnevndini. Leiðarin skal eisini verða við til at byggja upp barnaverndartænastuna, so henda verður virkin tann 1. januar 2006, tá kommunurnar yvirtaka hana. Leiðarin kemur eisini at hava samskifti við m.a. tannlækna, kommunulækna, skúlaheilsusystir, dagstovn, kommunalu dagrøktina og landsmyndugleikar.

**Førleikakrøv**
Vit leita eftir persóni, ið er útbúgvin sum sosialráðgevi. Tó kunnu eftir umstøðunum eisini aðrir umsøkjarar lúka treytirnar, um teir hava aðra í minsta lagi miðallanga útbúgving innan heilsu-, almanna- ella skúlaverk.

**Vit bjóða tær**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fært møguleika til at byggja upp og menna Sosialu deildina frá byrjan av.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. oktober 2005. Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Starvsmannafelagið.

**Hava tygum áhuga**
So eru tygum vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í seinasta lagi mánadagin 8. august 2005 kl. 15.00.

**Fleiri upplýsingar**
Fást við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 225111 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 211102.

Fuglafjørður, tann 7. juli 2005

**Fuglafjarðar býráð**

## BRYGGJUDANSUR í Vágsbotni

Vælumtókti **BRYGGJUDANSURIN** hjá Tórshavnar Bátafelag, verður frammanfyri hølum felagsins í **Vágsbotni, leygarkvøldið 23. juli frá kl. 21.00 - kl. 04.00.**

LM band spælir góðan dansitónleik, eisini verður farið upp á gólv.



**Vælumtókti "Bátabúffurin" av grillini fæst til keyps**

**Tórshavnar Bátafelag**

# ARKITEKTUR/ BYGGIFRØÐINGUR

Søkt verður eftir arkitekti, byggifrøðingi, ella teknikara við aðrari viðkomandi útbúgving.

Ert tú áhugaða/ur í avbjóðingum á einari ungari teknistovu í menning, har arbeiðsumstøður og arbeiðsumhvørvi verða sett í hásæti?

**Arbeiðsuppgávur**
*Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna m.a. um:*
- um- og nýprojektering av bygningum
- vega- og anleggsprojektering
- projektgransking
- útbjóðingar
- fakeftirlit og byggileiðslu

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava góð samstarvsevni og vera hugaður at arbeiða sjálvstøðugt við áðurnevndu arbeiðsuppgávum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða eftir nærri avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvi, lívsgongdarlýsing (CV) og møguligum viðmælum skal sendast til niðanfyristandandi adressu og vera okkum í hendi í seinasta lagi 5. august 2005.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

**EM RÁÐGEVING**
RÁÐGEVANDI BYGGIFRØÐINGAR

EM Ráðgeving Sp/F
Heiðavegur 15 A • FO-600 Saltangará
Tlf.: 47 77 00 • Fax: 47 77 01 • emr@kallnet.fo

Sosialurin 341800

# í Sosialinum verða húsini seld

HESTPRENT - TEL. 314 555

SETHÚSAMARKNAÐURIN

Lesið Sosialin -so eru tit við!

# Lýsing eftir dagrøktarum

Søkt verður eftir dagrøktarum til kommunalu dagrøktina í Fuglafjarðar kommunu at byrja tann 15. august 2005 ella skjótast eftir hetta.

Størvini, talan er um, eru tíðaravmarkað fyribils til 1/2 ár til 15. februar 2006.

Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya fyri dagrøktarar.

Nærri upplýsningar um størvini fáast við at ringja til Eyðgerð A. Petersen, dagrøktarleiðara á telefon 214950.

Møguligar umsóknir, ið skulu verða skrivligar, skulu vera Fuglafjarðar kommunu, Postboks 30, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 1. august 2005 kl. 15.00.

Kommunan skilir sær rætt til at velja millum innkomnar umsóknir ella onga at taka.

Fuglafjørður, tann 6. juli 2005

**Fuglafjarðar kommuna**

# Skála skúli

**Søkt verður eftir einum lærara til tíðaravmarkað starv við uml. 16 tímum. Viðkomandi skal helst kunna hava hesar lærugreinar: handaverk og list, føroyskt, danskt, enskt, lívfrøði, heimstaðarlæru, ítrótt/svimjing gentur og sertímar.**

**Starvið eru vegna avlopstímar og serligan tørv.**

Starvið verður lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast frá fyrstalæraranum á tlf. 442118 ella 586005.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 30. juli 2005.

**Skúlastýrið fyri Skála skúla**
v/ Rosu Prestá
480 Skáli

# Til sølu

Citroen Xsara 2,0i 16v Stw
Koyrt 62250 km
Árgangur des. 98
Ljósagrátt metallak
El rútar
El spegl
Fjarstýrt centrallás
Klimaanlegg
Rattstýrt radio
Servica ok og tannreim útskift
Nýggj dekk og alufelgur
Rustviðgjørdur
Ein góður bilur
Prísur 94800,- kr.
Bilurin kann síggjast og roynast á verkstaðnum hjá Kollskerð á Hjalla, tlf. 311013
Myndir www.autoliner.dk ella www.kollsker.fo